TILTØK

Framtíðin í Vági
Leygarkvøldið kl. 21 Møti, ung og tilkomin luttaka við lovsangi, solosangi, drama og vitnisburði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Møtiskrá hjá Hera Elttør trúboðara í DK
Fríggjakvøldið 18. og leygarkvøldið 19. jan kl. 19.30 missiónsvika á Sjómansheiminum í Hvide Sande.
Sunnudagin 20. januar kl. 17 Møti í Sønderborg (Missónshúsinum Møllegade 9).
Mánadagin 21. Missiónsvika í Kloster v/ Ringkøbing kl. 19.30.
Mikudagin 23. kl. 19.30 Missiónsvika í Brande.
Hósdagin kl. 19.30 Møti í Ans missiónshúsi.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya,
Bryggjubakki 10,
100 Tórshavn
tlf. 311391/261516.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 21. januar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman við teppir til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
Týsdagin 22. januar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Jóhann R. Jacobsen. **Øll eru hjartaliga vælkomin**
kl. 15 Prát um Tinganes
Mikudagin 23. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur – Framsýning í Listaskálanum
Hósdagin 24. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 25. januar
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 20. januar verður lættur gongutúrur: Reynsmúlalág, Velbastaðgøtan og fram við nýggja vegin til Gomlurætt. Farið verður av Krossinum (v. Velbastaðvegin) kl. 11. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

AA-fundir í Havn
Reinsarið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.Týskvøld: Er bara fundur ólíka viku nr.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

VBA (Vaksin børn til alkoholikara) ella ørkymlandi familjuumstøður. **Opin** fundur sunnudagin kl. 17.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Al-anon
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
Þ. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10
tlf./fax 321520
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfrið Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail:
ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk,ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang,
Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 5. februar kunnu hjúnini Marjun og Jákup Frants Larsen, Fuglafjørður, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 9. februar kl. 19 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja verða við til at hátíðarhalda dagin saman við teimum, verða biðin um at siga frá á tlf. 444102 í seinasta lagi leygardagin 20. januar 2002.

BRÚDLEYP

2. februar giftast í Kelduni Arni Abrahamsen, Glyvrar og Annebeth Gaard Joensen, Skipanes. Vígslan er kl. 14. Kl. 20 eru øll vælkomin til ein kaffimunn í Bygdarhúsinum á Strondum. Tit, ið vilja gleðast við okkum henda dag, kunnu tekna tykkum á tlf. 441557 ella 449057 innan 20. januar.

9. februar siga Rannvá Heinesen og Bogi Dam av Argjum ja til hvørt annað í samkomuni Imanuel kl. 14. Veitslan verður í Pálsstovu kl. 19.30. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin at siga frá áðrenn 20. januar á tlf. 315351 ella 312609 eftir kl. 15.

Leygardagin 16. februar kl. 14 giftast í Rituvíkar kirkju Ulla Hüche Nielsen, Vejle og Ian Højgaard, Rituvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp verða biðin um at siga frá áðrenn 2. februar á tlf. 447634 ella 448056.

Atlantic Airways víðkar flúgvingina til Billund

FLOGFERÐIR
Eirikur Lindenskov

Flúgvingin hjá Atlantsflog til Billund hilnaðist so væl í fjør, at flogfelagið nú hevur gjørt av at vaksa um flúgvingina til Billund í summar úr trimum upp í fýra fráferðir.

Flogið verður til Billund týsdag, hósdag, leygardag og sunnudag í juni, juli og august. Allar dagar verður rutusamband við bussi til Vejle og Århus.

– Tað búgva nógvir føroyingar í Jútlandi, og tað hevur nógva ferðslu við sær – serliga um summarið, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

– Men Jútland er eisini sera væl umtókt sum frítíðarstað, og eg hugsi, at nýggja leygardagsfráferðin hjá okkum hóskar tak væl til teirra, sum skulu í summarhús ella á frítíðarpláss at verða, sigur hann.

Vanliga byrja og enda leigumál í summarhúsum og á frítíðarstøðum leygardag. Atlatnsflog og ferðaskrivstovurnar hava hópin av frítíðarstøðum og summarhúsum um alt Jútland at bjóða, sigur Magni Arge.

Skipaeftirlitið yvirtikið

Skipaeftirlitið varð tann 1. januar 2002 yvirtikið sum føroyskt sermál sambært løgtingslóg nr. 166 frá 21/12/2001 um at yvirtaka málsøkið »Trygd á sjónum« og løgtingslóg nr. 165 frá 21/12/2001 um »Trygd á sjónum«.

Skipaeftirlitið hoyrir undir Fiskimálstýrið.

Søfartsstyrelsen hevur áður umsitið »Trygd á sjónum«, og hava føroyingar lítla og onga ávirkan havt á hesum øki.

Nú verður Skipaeftirlitið fyribils umsitið sambært donskum lógum og reglugerðum, men sum fráliður er ætlanin er gera allar lógir og reglugerðir føroyskar.

Reglugerðirnar hjá Skipaeftirlitinum skulu altíð lúka allar altjóða treytir, sum IMO og tílíkir felagsskapir seta. Av tí, at umboðan í IMO er úttanríkismál, verða Føroyar umboðaðar av Danmark, og verður hetta gjørt so leingi ongin onnur avtala er.

Á skipaeftirlitinum arbeiða í løtuni seks starvsfólk, og seinni í ár verður skipaeftirlitið flutt til Vágarnar.

Allir fyrispurningar um sýn av skipnum, nýbygningum, innflutning av skipum, bátum við meira, við Skipaeftirlitið skal góðkenna, eiga at verða stílaðir til: Skipaeftirlitið, J. Broncksgøta 5, Postbox 112, 100 Tórshavn. Telefon 311188 og telefax 318882.

-ib

VALUTAKURSIR

		17.01.02	Ultimo desember
USA	**Dollarar**	842,5100	824,1100
Bretland	**Pund**	1209,3300	1201,5000
Týskland	**Markur**	379,8950	380,4500
Svøriki	**Króna**	80,0600	78,6300
Noreg	**Króna**	94,0400	92,9700
Frakland	**Frankur**	113,2711	113,4400
Belgia	**Frankur**	18,4187	18,4460
Sveits	**Frankur**	506,8600	504,4000
Holland	**Gyllin**	337,1132	337,6500
Italia	**Liri**	0,3837	0,3843
Finnland	**Markur**	124,9653	125,1500
Ísland	**Króna**	8,1700	8,1000
Eysturríki	**Skillingur**	53,9966	54,0750
Spania	**Pesetas**	4,4656	4,4720
Portugal	**Escudos**	3,7061	3,7120
Kanada	**Dollari**	522,1400	526,0400
Grikkaland	**Drakmur**	2,1805	2,1840
Japan	**Yen**	6,3794	6,4368
Írland	**Pund**	943,4281	944,8000
	Evra	743,0100	744,0900

FØROYA SPARIKASSI

ÚT- OG SJÓNVARPSSKRÁ

BBC WORLD

Leygardagur 19. januar
0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Click Online (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 The Money Programme (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 Holiday (r)
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 Talking Movies (r)
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 Simpson's World (r)
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 Click Online (r)
8.00 BBC News – followed by Weather
8.10 The Road to Riches: »Risky Business« 3:6
9.00 BBC News – followed by Weather
9.10 High Stakes: »Gambling Fever« 3:3
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Top Gear (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 This Week
12.00 BBC News – followed by Weather
12.10 The Road to Riches: »Risky Business« (r) 3:6
13.00 BBC News – followed by Weather
13.10 Horizon: »Beyond A Joke«
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Click Online (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.10 High Stakes: »Gambling Fever« 3:3 (r)
16.00 BBC News – followed by Weather
16.30 Simpson's World (r)
17.00 BBC News – followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News – followed by Weather
18.30 This Week (r)
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 Life (r) Area K
20.00 BBC News – followed by Weather
20.10 The Road to Riches: »Risky Business« (r) 3:6
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 Talking Movies (r)
22.00 BBC News – followed by Weather
22.10 Horizon: »Beyond A Joke« (r)
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 Simpson's World (r)

Sunnudagur 20. januar
0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 This Week (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Simpson's World (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Correspondent – Letter from America (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 This Week (r)
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 Top Gear (r)
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 Reporters
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 Rough Science: »Energy/Remedies« (r)
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 This Week (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.10 Horizon: »Beyond A Joke« (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Click Online (r)
11.00 BBC News – followed by Weather

fæst á apotekunum kring landið

Kall søkir edv-fólk

Kall viðkar um internet-kervið. Í sama viðfangi verður sókt eftir einum evnarikum og dugnaligum fólki til rakstur og útbygging av servarum og routara-kervinum.

Ert tú ágrýtin, góður at samstarva við og kanst arbeiða sjálvstøðugt, so er tað kanska tær, vit hava brúk fyri. Tú mást vera tolgóður til skjalfesting og hava hugin at læra.

Vit hugsa okkum, at tú hevur eina viðkomandi edv-útbúgving sum til dømis datamatikari. Tað er umráðandi, at tú hevur vitan um IP-kervi og arbeiðsroyndir frá teldukervum við Win NT og Win 2000 servarum.

Vit kunnu bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning í einum virki, ið vil vaksa seg stórt í meldrinum av kunningartekni.

Stutt sagt skalt tú duga við tólum og fólkum á einum arbeiðsplássi, har tað gongur skjótt fyri seg.

Lønin verður ásett eftir farlelka, útbúgving og royndum. Starvið verður sett skjótast til ber.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hin 28. januar 2002. Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til Terja Durhuus, telefon 202071.

Endamálið hjá Kall er at vera eitt føroysk fjarskiftisfyrivtøka, ið er fer fyri at kappast – til gagns fyri brúkaran. Felagið eftirsøkir altid at veita ta bestu tænastuna og at vera mest nýskapandi á føroyska marknaðinum.

kall

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postkort 3239 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo

Orðið er litt